


*Hvørt ár flokkast fleiri 10.000 fólk til ein stóran bóndagarð í statinum Illinois at hoyra og annars uppliva kristnan rokk og metal tónleik og alt tað, ið har til hoyrir*

av. Onkrar vóru orduliga kular við kreativum og provokerandi motivum, meðan aðrar vóru snøgt sagt ræðuligar. T.d. gingu nógv fólk við "God created Adam and Eve, not Adam and Steve" á rygginum. Ein bestseljari millum penu suðurstatsdiddurnar var ein við "I love my husband" framman og "and I haven't even met him yet!" aftan. Spyr meg ikki í hvørjum universi, hatta gevur meining.

Hetta er jú ein kristin festivalur, so fleiri anti-abort felagsskapir høvdu básar (ein av teimum, Rock for Life, skipaði enntá fyri einum av pallunum). Við ein av teimum kundi man blaða ígjøgnum ein faldara við myndum av aborteraðum fostrum. Ikki sørt ódámligt og ein spurdi seg sjálvan á hvønn hátt hetta hjálpti uppá nakað sum helst.

Mitt ímillum allar básarnar var eisini eitt stórt borð við eini rúgvu av fundamentalistiskum kúfangaraklistrimerkjum (bumper stickers á enskum). "The devil is pro-abortion", "Evolution – when scientists made monkeys of themselves", "It's cool to remain a virgin until marriage" og "They took prayer & Bible from public schools and now they have shootings" eru bara nøkur av dømunum.

Klistrimerkini áttu at keypast, men eg tímdi ikki at stuðla, so eg stjól nøkur fyri kultvirðið.

Eg heilsaði eisini uppá ein lítlan bólk av eysturortodoksum punkum, sum eg prátaði um tríeinigheitina og liturgi við og keypti eina systematiska teologiska bók frá.

Hóast alt hitt er feitt og deiligt, so er tónleikurin sjálvandi í miðdeplinum á einum festivali og hetta var eisini galdandi á Cornerstone.

Eg lurtaði eftir nógvum feitum bólkum, harav eg kendi onkrar áðrenn og aðrar ikki. Millum teir bestu, eg hoyrdi, vóru Underoath, Bernard, The Showdown, The Chariot, Demon Hunter, Becoming The Archetype, Haste The Day, P.O.D. og so sjálvandi Pillar.

Eg helt faktist Pillar vera ímillum teir bestu, eg hoyrdi á festivalinum. Eg kann stutt siga, at Pillar eru ein serstakliga feitur live bólkur, ið osar av spæligleði og –yvirskoti. Muskuløsi, men kensluborni bóndarokkurin varð spældur av ótrúliga dugnaligum tónleikarum. Serliga varð eg imponeraður av trummaranum. Hann spældi ein ultrafeita trummusolo, sum úrslitaði í umfatandi gásarholdi hjá okkum øllum. Hóast sangarin var eitt sindur hásur, so leiddi hann tó bólkinum og framførsluni við fastari hond og hevði eitt ógvuliga gott samband við fólki (sum annars vóru rættiliga nógv, so populerir Pillar eru millum tey kristnu í Amerika).




*Klistrimerkini áttu at keypast, men eg tímdi ikki at stuðla, so eg stjól nøkur fyri kultvirðið*

Millum teir serliga góðu sangirnar vóru "Dirty Little Secret", "Underneath It All", "Everything", "Fireproof" og "Sunday, Bloody Sunday" hjá U2, sum ikki átti at riggað, men gjørdi tað í yvirmát. Framførslan hjá Pillar stóð eftir sum ein ótrúliga feit av slagnum frá einum bólki, ið veruliga hevur check uppá tingini og eina rúgvu av rutinu í reyvalummanum.

Eg gleði meg, at hoyra Pillar aftur á Fjarðafestivalinum og vænti og veit, at øll, ið dáma feitan modernaðan rokk, fara at ránjóta Pillar.